


***Nr. 15*** ***18. juli 2021*** ***81. árg.***

# Hvat møtir okkum, tá ið vit vakna?

Vit Jesus-trúgvandi **sovna burtur** í trúnni á Kristus. Hava vit nakra hóming av, hvat **møtir okkum, tá ið vit vakna?** Ja, so avgjørt. Áðrenn Jesus fór frá lærusveinunum, segði hann soleiðis í Jóh. 14,1–3 N.S.:

„Tit skulu ikki ræðast. Trúgvið á Gud, og trúgvið á meg. Í húsinum hjá Faðir mínum eru nógv rúm. Var tað ikki so, hevði eg ikki sagt, at eg fari burtur at gera tey til reiðar til tykkara. Og tá ið eg havi gjørt tey til reiðar, komi eg aftur og taki tykkum til mín, tí at tit skulu vera har, sum eg eri."

Um hetta var tað einasta, sum stóð um lívið eftir deyðan, so hevði tað verið meira enn nóg mikið fyri meg: **Jesus kemur eftir okkum – og vit skulu altíð vera saman við honum!** Eg hvíli tryggur, takksamur og vónríkur í hesum lyftinum. Tí okkara trúgv er **ikki ein blind trúgv**.

Hon er bygd á Guds lyfti, sum til denna dag hava verið 100% álítandi. Samstundis er Guds framúrskarandi skaparverk ein sjónlig 100% lýsing av Guds kærleika, makt og vísdómi. (Róm. 1,19).

Harumframt hava vit ein perlukrans av upplýsingum í 1. Kor. 15 um tað, sum vit síggja, tá ið vit vakna:

* Eitt forgongiligt likam verður lagt í jørðina –
* vit vakna í einum óforgongiligum likami. (v. 42)
* Eitt virðisleyst likam verður lagt í jørðina –
* vit vakna í einum **dýrdarlikami**.
* Eitt veikt og máttleyst likam verður lagt í jørðina –
* vit vakna í einum likami **fult av styrki.**

* Tað hendir í einum eygnabragdi. Tá ið lúðurin gellur, rísa øll tey deyðu, sum vóru kristin, upp við nýggjum óforgongiligum likamum –

* og vit onnur, sum enn liva, **verða fullkomiliga broytt**.

Tá ið ein sjúklingur vaknar úr doyvingini, eru hann ella hon altíð spent uppá, um skurðviðgerðin eydnaðist. Hasin spenningurin er fyri hin Jesus-trúgvandi settur úr gildi! Væleydnaða skurðviðgerðin bleiv fyri 2.000 árum síðani staðfest, tá ið Jesus segði hesi orðini: **Tað er fullgjørt!** Vit vakna til æviga dýrd saman við Faðir, Soni og Heilaga Anda – pluss eini ørgrynni av einglum. Vit kenna navnið á tveimum: Gabriel og Mikael.

Billy Graham segði einaferð: „Heim mítt er í Himli. Eg eri bara á gjøgnumferð í hesi verð!" Hann er heima nú. Mong koma aftaná hvønn einasta dag. Og vit, sum trúgva, eru eisini á gjøgnumferð á veg heim.

*Effie Campbell* umsetti.

# Fimm útvaldar kvinnur

Móses er týdningarmesti persónur í Gamla Testamenti. Móses var tann, sum sameindi ísraelsku ættirnar til eitt fólk. Hann var eisini tann, sum lærdi fólkið at dýrka Harran, og tað var hann, sum kom oman av fjallinum við lógartalvunum, ið hann hevði fingið frá Harranum.

Av tí at hann hevði eina so týdningarmikla uppgávu og skuldi føra fólkið aftur til Lyftislandið, so lá Satan eftir honum alla tíðina. Men Gud veit, hvønn Hann kann brúka í síni tænastu, og Hann valdi sær út fimm kvinnur, ið skuldu bjarga Mósesi. Her koma tær:

1. **Jarðarmøðurnar**. „Kongurin í Egyptalandi segði nú við jarðarmøðurnar…: „Tá ið tit hjálpa teimum hebraisku kvinnunum at eiga, ansið tá væl eftir, tá ið barnið kemur! Er tað drongur, so drepið hann, men er tað genta, so kann hon liva!" Men jarðarmøðurnar óttaðust Gud og gjørdu ikki, sum kongurin í Egyptalandi segði við tær – tær lótu dreingjabørnini liva." 2. Mós. 1,15–17 V.D.

2. **Mamman**. „Og konan (mamma Mósesar) var við barn og føddi son; og tá ið hon sá, at barnið var frálíka vakurt, krógvaði hon tað í tríggjar mánaðir." 2. Mós. 2,2.

3. **Systurin**. „Men tá ið hon (mamman) ikki fekk krógvað hann longur, bant hon honum kistu úr sevi, bræddi hana við jarðlími og biki, legði dreingin í kistuna og setti hana út í sevið við Níláarbakkan. Systir hansara tók støðu eitt sindur har frá til tess at vita, hvussu honum mundi fara at gangast.“ 2. Mós. 2,3–4.

4. **Dóttur Farao**. „Tá kom dóttir Farao at baða sær í ánni … Hon kom tá at síggja kistuna í sevinum og sendi gentu sína avstað at taka hana. Tá ið hon læt hana upp, sá hon barnið – har lá ein drongur og græt. Tá tykti henni synd í honum, og hon segði: „Hetta er eitt av dreingjabørnum hebrearanna!“ Nú segði systir hansara við dóttur Farao: „Skal eg fara og fáa tær eina daddu av teimum hebraisku kvinnunum at fostra tær barnið upp? Dóttir Farao svaraði henni: „Ja, far!“ 2. Mós. 2,5–8 V.D.

5. **Kona Mósesar**. „Men á vegnum, har sum tey gistu um náttina, kom Harrin ímóti honum (Mósesi) og ætlaði at drepa hann (tí at hann ikki hevði umskorið sonin. Tað var sáttmálateknið) Tá tók Zippora hvassan stein og skar yvirhúðina á syni sínum av … so læt Harrin hann vera.“ 2. Mós. 4,24–26 V.D.

*Effie Campbell.*

# Ágangandi bøn

Mangor Aanensen, sum er systkinabarn songkvinnuna Synnøve Aanensen, er úr Karmøy. Hann er tónleikari. Hann vitnaði á Visjon Norge:

„Eg eri ljótasti nýføðingur, sum er borin í heim á sjúkrahúsinum. Eg hevði onga húð, tá ið eg kom í verðina, holdið var bert. Eg eri føddur við psoriasis, og eg fekk alla viðgerð, sum læknar vistu um: tjøruviðgerð, D-vitaminir, alskyns salvur og krem, kortison, ljósviðgerð, Tea Tree Oil og mangt annað. Eg batnaði eitt sindur viðhvørt, men so herjaði tað á aftur. Eg var heppin, meðan eg hevði eitt av mínum frægu tíðarskeiðum, bleiv eg giftur.

Eg arbeiddi úti á einum boripalli. Ein dagin, tá ið vit stóðu fleiri saman, segði eitt av konufólkunum nakað særandi við meg um mína útsjónd vegna sjúkuna. Hon ætlaði helst ikki at særa meg. Hon hugsaði seg ikki nóg væl um, men tað rakti meg ógvuliga meint. Tað var, sum hjartað fór í knús. Eg fór oman á kamarið og var djúpt, djúpt ólukkuligur.

Eg eri trúgvandi, og eg veit, at Gud kann grøða. Men nú var eg so niðurundirkomin, at eg smekkaði nevan av dýrastu makt móti hurðini á klædnaskápinum og skeldaði Gud út um hesa herviligu sjúku. Hurðin fór í knas, og eg tørnaði inn.

Morgunin eftir fór eg upp. Tá ið eg læt meg í buksurnar, gav eg mær far um, at eg fekk ikki ilt. Tá sá eg, at eg var grøddur. Húðin var hvít og sløtt sum á lítlum barni. Øll tann skrubbuta og roðslukenda húðin lá eftir á lakinum.

Tá rann tað alt í einum fram fyri meg, at Jesus í Lukas 18 biður okkum vera áhaldandi og framlig í bønini, tá ið hann sigur okkum um einkjuna og hin órættvísa dómaran. Tú skuldi lisið Luk. 18,1–8.

*Effie Campbell.*

# Himmalin

Himmalin er eitt heilagt stað – staðið, har Gud dvølir. Bíblian lýsir vakurleikan og skreytið har. Himmalski staðurin er klæddur við reinum gulli, ja, sjálvt gøturnar eru steinsettar við sama glógvandi metali, sum er klárt sum glas. Tað eru tólv portur, og hvørt teirra er úr einari perlu. Múrurin um staðin er úr glæsiligum gimsteinum. Staðurin hevur hvørki brúk fyri sól ella mána, tí Harrans dýrd upplýsir hann, og lambið er ljós hansara. (Opb. 21,23).

Sjálvt um henda frágreiðingin er strálandi vøkur, so sigur Orðið kortini: „Tað, sum eyga ikki sá, og oyra ikki hoyrdi, og ikki kom upp í mannahjarta, tað sum Gud hevur tilbúgvið teimum, sum elska hann.“ 1. Kor. 2,9.

Hetta vakra staðið er Guds bústaður, har Hann saman við sínum heilagu skal liva í endaleys ár. Tað er ikki neyðugt hjá nøkrum at standa uttanfyri, tí loysigjaldið er goldið fyri øll, so at ein og hvør, sum av sonnum og heilhugaður angrar syndir sínar og bjóðar Jesusi inn í hjartað, verður frelstur.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 16*** ***1. august 2021*** ***81. árg.***

# Vit liva í einari ræðandi verð

Eg hoyrdi ein ungdóm siga í danska sjónvarpinum: „**Vit liva í eini ræðandi verð. Hvagar skulu vit fara**?“

Uttan mun til pandemiir, lógloysi, yvirgang og torførar tíðir – so er **sannleikin** hesin:

GUD ER OKKUM VERND OG VERJA -
EIN HJÁLP Í TRONGDUM, IÐ ALDRI SVÍKUR.
TÍ ÓTTAST VIT EI –
UM SO JØRÐIN VERÐUR UMSKIFT –
UM SO FJØLLINI RYÐJA Í HAVDÝPIÐ OMAN –
UM SO HAVALDAN SJÓÐAR OG BRÝTUR –
OG BERGIÐ Í ÓDNINI SKELVUR.“
GUD ER OKKUM VERND OG VERJA!

*Sálmur 46,2–4.*

„Hvagar skulu vit fara?“ spurdi unga gentan í danska sjónvarpinum. FAR TIL JESUS!

Har møtir tú Guds Faðirhjarta, og Hann er mentur at fylla teg við friði, lívi og meining í einari ræðandi verð. Og tá ið Jesus kemur aftur, skalt tú heim við honum til tað staðið, Hann hevur fyrireikað til tín.

So bjóða Honum inn í hjarta títt, set títt álit á Hann. Hann leiðir teg ígjøgnum alt trygt heim til sín.

*Effie Campbell* umsetti.

# Rættvísi

Um vit trúgva tí, ið stendur skrivað hjá Jákupi 5,16, at „Megnað bøn av rættvísum manni (ella konu) er mikið ment!“ – so fáa vit eisini dirvi at biðja inn í eina støðu, sum í mannaeygum sær ógjørlig út.

Vit fáa ikki rættvísi við at gera nakað. Trúgvin á Jesus GER teg og meg RÆTTVÍS – við tí rættvísi sum eina Jesus hevur.

Tú sigur kanska: „Uff, eg eri ikki serliga rættvís!“ – Jú, í grundini ert tú 100% RÆTTVÍS, so satt sum tú trýrt á Kristus. Tak tær stundir at lesa 3. kap. í Rómverjabrævinum.

Har sært tú tey einastandandi góðu tíðindi: At vit, eins og øll onnur hava syndað og eru vikin frá Gudi – men fáa FYRIGEVING og RÆTTVÍSI VIÐ TRÚNNI Á JESUS KRISTUS. Skrivað stendur, at vit VERÐA GJØRD rættvís fyri einki av Guds NÁÐI. (v. 24).

Vit verða frelst TIL at gera góðar gerningar – IKKI VIÐ góðum gerningum. Okkara bøn í Jesu NAVNI er mikið ment. – Minst nú til tað, tá ið tú ert illa fyri.

*Effie Campbell* umsetti.

# Móses slapp inn í Lovaða Landið

*Johan Maasbach*

Í 5. Mós. 34. kapitli, vers 9 lesa vit: „Jósva Nunsson var fullur av vísdóms anda.“ Hví? Jú, tað stendur víðari: „ ... av tí at Móses hevði lagt hendur sínar á hann.“

Gud segði: „Móses, eg fari at kalla teg heim. Tak Jósva, tí tú skalt ikki fara yvir um Jórdan og inn í landið.“

Ein maður, sum var gudloysingur, segði við meg: „Tín Gud er ikki góður. Bara tí at Móses gjørdi eitt mistak, so slapp hann ikki inn í Lovaða Landið.“

Eg svaraði honum: „Eg síggi, at tú kennir ikki Bíbliuna. Hvat gremur tú teg um? Tú sigur, at tú trýrt ikki, at Gud er til, og so gremur tú teg um okkurt, sum ikki er til. Móses fór inn í Lovaða Landið. Hann fór gjøgnum luftina, og hann møtti Jesusi á Umbroytingarfjallinum – sum liggur í Ísrael, Lyftislandinum. Móses var har. Eg veit ikki, hvussu tað hendi; men hann var har. Vell, hann fór ikki inn tann vegin, sum Ísraels fólk fór.“

Móses var eitt fyridømi upp á lógina, og við lógargerningum kunnu vit ongantíð koma inn til hvíluna. Tað er nakað, sum tilhoyrir Guds børnum. Jósva var hin útvaldi maðurin, og Gud segði: „Tak Jósva!“ Veitst tú, Móses skilti hetta ikki ta ferðina. Hann bønaði og bað Harran tríggjar ferðir: „Góði Harri, lat meg sleppa yvir um Jórdan.“ Men Gud noyddist at verða stívur við hann; men tað var ein orsøk til tess, tí hann var eitt dømi upp á lógina, og hann visti ikki tá, at hann fór at fáa tey forrættindi, at hann skuldi sleppa at møta Jesusi á Umbroytingarfjallinum og sleppa at ugga hann.

Jósva er tann, sum førir okkum inn til hvíluna og inn í Lyftislandið, og honum tørvar vísdóm, so Gud segði: „Móses, legg hendur tínar á Jósva.“ Bíblian sigur, at Jósva var fullur av Guds vísdómi, av tí at Móses hevði lagt hendurnar á hann. Er Bíblian ikki ein undurfull bók? Hon tosar um tað at salva og leggja hendurnar á eisini í Gamla Testamenti.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tá ið einki annar nyttar, virkar kærleikin

*„Tit menn, elskið konur tykkara ...“ Ef. 5,25.*

Eftir at John hevði verið giftur í mong ár, gjørdi hann av, at nú vildi hann skiljast frá konu síni. Grundgevingin, hann gav hjúnaráðgevanum, var henda: Hon er einki hugtakandi ella eiggilig. Hon er einki áhugaverd. Hon er ov tjúkk. Hon dugir als ikki at halda hús.“

Ráðgevin kom við hesum hugskotinum: „Far heim og byrja í dag at fara um konu tína sum eina gudinnu. Tú skalt byrja við at gera alt, sum tú kanst, at gera hana nøgda. Lurta gjølla, tá ið hon greiðir frá sínum trupulleikum. Hjálp henni allastaðni í húsinum og bjóða henni út í vikuskiftunum. Tú skalt bókstaviliga lata, sum er hon ein gudinna. Síðani kanst tú, tá ið tveir mánaðir eru farnir við hesum nýggja atburði tínum, pakka tíni kuffert og fara. Tað fer at geva henni okkurt at hugsa um!“

John helt hetta vera eitt gott hugskot, og hann gjørdi av at gjøgnumføra tað. Hann bjóðaði konu síni á nøkur romantisk vikuskifti og las skaldskap upp fyri henni hvørt kvøld.

Tá ið tveir mánaðir vóru farnir, ringdi ráðgevin til John og spurdi: „John, hevur tú søkt um hjúnaskilnað? Gleðir tú teg til aftur at vera ein leysur kroppur?“

John svaraði: „Heldur tú meg fyri gjøldur? Eg eri giftur við eini gudinnu. Eg havi ongantíð í lívinum verið lukkuligari. Eg fari ongantíð frá konu míni. Tað er sanniliga so, at eg uppdagi nýggjar síður av henni dagliga. Hjúnaskilnað? Ongantíð í lívinum!“

Bíblian sigur: „Tað, sum maður sáar, tað skal hann eisini heysta.“ Gal. 6,7. Og tá ið John broytti sín framferðarhátt og fór undir at sáa kærleikans fræ, heystaði hann eitt hjúnalag, sum hann ongantíð hevði droymt um. Heldur tú, at tað er gjørligt, at sami framferðarháttur kann virka fyri teg? Hvat hevur tú at missa?

*Royn einaferð og vita, hvat ið hendir. So er møguleikin har, at tú og hjúnafelagi tín fara at elska tað, sum spyrst burturúr.*

*„... et Ord til Dagen“*
*Effie Campbell* umsetti.

# Bíblian hevur stóran týdning

Tá ið tú fert við Bíbliuni undir hondini, fær Satan høvuðpínu. Tá ið tú letur hana upp, fær hann ein skelk. Tá ið hann sær teg lesa í henni, svímar hann. Tá ið hann sær, at tú livir samsvarandi Bíbliunnar orðum, flýggjar hann. Og beint, tá ið tú ætlar tær at seta henda tekstin á tín FB-vanga, fer hann at royna at taka dirvi frá tær.

*e.c.* ums.

---

Tað nyttar ikki at spyrja: „Hvar vart tú, Gud?” Summir spurningar eru okkum ov stórir. Vit mugu bara ásanna okkara vantandi evni at skilja alt. Tað eru eingi einføld svør. „Harrin loysir fyrst leinkjur, síðani gátur,“ sum Skovgaard-Petersen sigur.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74